# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Nordjysk Lift í nýggjum virkisbygningi

**Útleigufyritøkan Nordjysk Lift er flutt í nýggjan virkisbygning á Hjalla. Í hesum sambandi verður almenn móttøka og framsýning fríggjadagin 6. november**

AMBOÐ & MASKINUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sambandi við at føroyska deildin hjá donsku útleigufyritøkuni Nordjysk Lift er flutt í nýggjan virkisbygning á Hjalla verður almenn móttøka fríggjadagin 6. november frá kl. 14 – 17, har bygningurin verður sýndur fram eins og maskinur og amboð, sum fyritøkan leigar út.

Deildin í Føroyum er tann 19. í danska kongaríkinum. Nýggi virkisbygningurin er upp á 500 fermetrar. Talan er um ein stóran og høgan bygning, har maskinur í øllum støddum passa inn.

Leiga heldur enn at eiga, eru slagorðini hjá Nordjysk Lift. Tað eru nógvir fyrimunir hjá arbeiðstakarum og privatfólki at leiga sær arbeiðstól til uppgávur, sum annars krevja nógva arbeiðsorku ella stórar íløgur. Vit skulu vera amboðsdeildin hjá arbeiðstakarum í Føroyum, sigur Geir Wardum, dagligur leiðari í fyritøkuni, sum leigar út arbeiðstól í so gott sum øllum støddum.




*Geir Wardum, Eyðun Egholm og Heini Christensen uttan fyri nýggja bygningin á Hjalla*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ferðslutrygd og royndarkoyring í Bilradio

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sendingini Bilradio hósdagin kl. 16.05 verður vitjað á Reinsarínum í Tórsgøtu, har Ráðið fyri Ferðslutrygd hevur undirvísing fyri næmingum í 8. flokkunum. Prátað verður við Jón Kragesteen, verkætlanarleiðara, Oluf Mortensen frá politinum, Juttu Reynslág og Rana Skaalum, lærarar, og Sølva Reinert Hansen frá Ferðslutrygd.

Eisini verða tveir nýggir Volkswagen royndarkoyrdir saman við Fróða Clementsen frá Bilasøluni í Hoyvík. Talan er um VW Polo og VW Golf BlueMotion.




*Fróði Clementsen søluleiðari á Bilasøluni í Hoyvík*
*Mynd: Magnus Gunnarsson*



*VW Transporter er kosin ársins vørubilur í Danmark 2010*

# Ársins vørubilur í Danmark

VØRUBILUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nýggjasta útgávan av VW Transporter er kosin Årets Varebil i Danmark 2010.

VW Transporter er kosin ársins vørubilur í Danmark 2010, framman fyri Iveco Daily og Mercedes-Benz Sprinter, sum vórðu ávikavist nummar tvey og trý.

Nýggi VW Transporter kemur á marknaðin í hesum mánaðinum.